# Ítróttarblaðið

## Landsliðsleikarar sleppa ikki upp í part

Hóast tað gongur illa hjá Frem, so sleppa hvørki Bogi Løkin ella Jónas Þór Næs upp í part fyri tíðina. Aftur í gjár byrjaðu teir báðir á beinkinum og har vóru teir sitandi allan dystin, hóast liðið var aftur úr við fýra málum og ikki skoraði fyrr enn tað restaðu sjey minuttir. Frem skoraði eisini einaferð í yvirtíðini, so endaliga úrslitið gjørdist at uppflytararnir FC Vestsjælland vunnu 2-4. Bogi Løkin ella Jónas Þór Næs hava annars júst fingið landsliðsboð til venjingardystin móti Luksemburg 4. juni, men tað er eftir øllum at døma ikki nóg mikið fyri at koma upp í part í Frem, sum tykist at hava spilt sínar kjansir fyri at varðveita sætið í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Fimm dystir eru eftir at spæla og liðið hevur sjey stig upp til næsta liðið omanfyri niðurflytingarmarkið.


**Ítróttartoymið á Sosialinum:**


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


# 10

stuttligastu sms'ini frá 3. hálvleiki

***Næsta HB-bókin skal eita: »Tá abbi vann á B36«***

*Niclas Niclasen veit væl, at tað er ÚTI-vika hesa vikuna*

*Lars! Eg haldi man kann læna dómarabókina á býarbókasavninum*

*Víkingar spældu sum skurar við maganum fullum av rosinum*

*Høvdu teir gomlu vita – Hargabrøðurnir stríðast ímóti hvørjum øðrum (Mortan og Súni)*

*Næsta sesong av »Emergency Room« verður tikin upp í Gundadali. Marcin Dawid skal hava høvuðsleiklutin*

*Nú er heitari í Runavík enn í Gøtu*

*Útvarparin hjá ÚF fann ein ÍF-ara í dag, tað var vist nokk eitt Gøtu-fund!!*

*Nú tað er Útivika, ja so vann AB úti í Vika*

*Næsta bókin hjá B36 eitur: »Táið langabbi gjørdist føroyameistari«*




*Rúni Seloy sæst millum tann írska og kroatiska rennaran*

# Rúni Seloy var trý sekund ov stuttur

**RENNING** Rúni Seloy gjørdist samanlagt nummar 20 av 36 rennarum á 1.000 metra teiginum á European Youth Olympics Trials í Moskva

Heri Simonsen

Rúni Seloy hevur í vikuskiftinum roynt seg á European Youth Olympics Trials á á tí kenda ítróttarøkinum, Luzniki Sport City í russiska høvuðsstaðnum, Moskva. Úrslitið Rúni Seloy rakk í Moskva má sigast at verða stak heiðurligt! Rúni og 35 aðrar rennarar vórðu býttur undur í tveir riðlar, so at heilir 18 dreingir runnu 1.000 m samstundis. Báðir riðlarnir vóru sera javnir, og tá serliga hin seinni riðilin, har Rúni var við. Bert sjey sekund vóru millum 14 teir fremstu í einum ógvuliga tøttum felti, tað sum summir rennarar nevna at verða í einum sonnum »grindaróðri«.

**Bert trý sekund frá finaluplássi**

Tíðin hjá Rúna Seloy fyri teir 1.000 metrarnar hann rann á Luzniki Sport City gjørdist 2 minuttir og 32,86 sekund – og var Rúni soleiðis bert trý sekund frá einum finaluplássi. Heimasíðan www.renn.fo við Halli Holm skrivar, at lítið er at ivast í, at Rúni við optimalari fyrireiking hevði havt sera góðan møguleika at komið í finaluna, og eisini hevði kunnað blandað seg í absolutta evropeiska toppin. Men tíverri hava knæskaðar darvað venjingini hjá honum bæði í vetur og vár. Hesaferð gjørdist Rúni Seloy so samanlagt nummar 20 av teimum 36 rennarunum á teimum 1.000 metrunum á European Youth Olympics Trials, men ein eigur at hava í huga, at bara tveir av teimum 20, sum runnu í hesi kappingini eru javngamlir við Rúna. Hinir eru allir eitt ár eldri enn Rúni.

*heris@sosialurin.fo*